umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning,

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **Nes kommuna** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Toftavegur 3, 650 Toftir | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At leingja verjugarðin á Tofta havn | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| 435a | 338486 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 18/00447-6 | zz. juli 2018 |

Lýst umhvørvisgóðkenning

Suni Petersen, deildarleiðari

30/07-2018

Ingvard Fjallstein, umhvørvisviðgeri

**Innihaldsyvirlit**

1 Góðkenning og heimild ..... 3
2 Umsóknin ..... 3
3 Lýsing av virkseminum ..... 4
4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum ..... 4
5 Málsviðgerð ..... 5
6 Góðkenningartreytir ..... 6
6.1 Almennar treytir ..... 6
6.2 Innrætting og rakstur ..... 7
6.3 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós ..... 8
6.4 Burturkast ..... 9
6.5 Rakstarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing ..... 9

Lýst umhvørvisgóðkenning

# 1 Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá Nes kommunu at leingja verjugarðin til havnarlagið á Toftum er givin við heimild í §§28 og 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Umhvørvisstovan gjørdi í kunningarskrivi hin 9. mars 2018 allar kommunur kunnigar við, at stovnurin var varugur við, at plastleivdir frá nonel-spreingiskipan, sum verður brúkt í grótbrotum og tunlum, fylgja við grótinum, tá tað verður flutt. Verður grótið slept á sjógv, skola plastleivdirnar av grótinum, flotna og reka burtur.

Umhvørvisstovan hevur eisini staðfest, at plastleivdirnar frá spreingileidningum reka upp á land, serliga nærhendis virksemi, har sprong grót verður fylt út á sjógv.

Umhvørvisstovan metir, at bert ein lítil partur av plastleivdunum, sum losna frá grótfyllingini, rekur upp á land, meðan stóri parturin av plastinum verður verandi í sjónum.

Út frá hesum metir Umhvørvisstovan, at útlát av plasti, tá grót verður koyrt á sjógv, t.d. í sambandi við havnargerð ella aðrar útfyllingar á sjónum, kann hava týðandi árin á umhvørvið.

Hóast virksemi at fylla grót út á sjógv ikki eru í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, boðaði Umhvørvisstovan í kunningarskrivinum frá, at stovnurin í hvørjum einstøkum føri fór at taka støðu til, um verkætlan at fylla grót út á sjógv skal hava umhvørvisgóðkenning ella ikki.

Heimild fyri at krevja, at virksemi, sum ikki er nevnt í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, skal søkja um umhvørvisgóðkenning, tá ið mett verður, at serligur tørvur á tí, er í §28 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Nes kommuna hevur tikið hetta kunningarskriv til eftirtektar og søkt um umhvørvisgóðkenning at leingja verjugarðin hjá Tofta havn.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Góðkenningin fevnir um arbeiðið hjá Nes kommunu og møguligum undirveitarum hennara at leingja verjugarðin hjá Toftan havn, so leingi byggiarbeiðið varir.

Góðkenningin er grundað á upplýsingar frá Nes kommunu. Tað er ábyrgdin hjá Nes kommunu, at upplýsingarnar, sum eru latnar Umhvørvisstovuni, eru rættar.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

# 2 Umsóknin

Nes kommuna søkti hin 25. mai 2018 um umhvørvisgóðkenning til arbeiðið at leingja verjugarðin til Tofta havn við 90 metrum. Samlaða grótnøgdin til arbeiðið varð mett til 135.000 $m^3$ í leysum gróti ella umleið 90.000 $m^3$ í føstum máti.

Lýst umhvørvisgóðkenning

Umframt umsókn um umvørvisgóðkenning, fekk Umhvørvisstovan hin 17. november 2017 eina umhvørvisárinsmeting av verkætlanini og eina búlendislýsing av botninum í sambandi við, at verkætlanin skuldi viðgerast sambært §21 í lóg um verju av havumhvørvinum[1].



Økið, har ætlanin er at fylla út, liggur sambært byggisamtykt fyri Nes kommunu sum framhald av D-øki: Havnarøki, men er ikki frámerkt á korti.

## 3 Lýsing av virkseminum

Í tilfarinum verður greitt frá, at ætlanin er at leingja verjugarðin 90 metur í ein útnyrðing úti á 20 til 25 metra dýpi. Eingir longdarskurðir ella tvørskurðir eru við tilfarinum, men greitt verður frá, at økisvíddin í vatnskorpuni er 23x90 metrar og økisvíddin á botni er 95x90 metrar.

Grót, umleið 135.000 $m^3$, verður fingið til vega úr Eysturoyartunlinum og ført við skipi av Strondum til Toftir. Grótið verður slept niður úr skipinum, har leingingin av verjugarðinum skal vera. Tá ið fyllan er komin nakað upp, kann væntast at gravismaskina fer at lyfta grótið upp úr sjónum og skapa grótkastið. Dekkgrót til verjugarðin verður flutt við lastbili.

Meðan arbeitt verður upp á verjugarðin, kann væntast nakað av útlátið frá skipum og maskinum og nakað av glintan frá skuffum og grabbum frá gravimaskinum, men roknað verður ikki við ristingum.

Nes kommuna er varug við, at nakað av plasti er uppi í grótinum, men hevur ikki gjørt nakra meting av, hvussu nógv. Kommunan ætlar at leggja flotverju út til tess at fora fyri, at plast frá grótinum rekur burtur frá fyllingini.

Grótkastið er einans ætlað at verja ímóti sjóvarilsku, og einki virksemi verður á tí, tá byggiarbeiðið er liðugt.

## 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Búlendislýsingin er gjørd av økinum í apríl og juni 2017. Kanningin staðfestir at búlendið er vanligt í Føroyum, har alda og rák eru avmarkað. Eingi sjáldsom dýr ella plantur vórðu staðfest á økinum, og mett verður at rekreativa virðið er sera avmarkað, vinnuvirðið er einki og fornfrøðiliga virðið er einki.

Umhvørvisstovan er kunnig við at grótveitarin, P/F Eystur- og Sandoyartunlar, brúkar NONEL System® spreingiskipan (stytt Nonel) til spreingiarbeiðið í Eysturoyartunlinum. Plastleivdir frá spreingiskipanini í tunlinum fylgja við grótinum, og verða skolaðir av grótinum, tá grótið verður slept á sjógv.

Út frá umsóknini sæst, at Nes kommuna er kunnig við, at plast kann vera upp í grótinum, men kommunan hevur ikki gjør nakra meting av hesum. Út frá verandi kunnleika metir Umhvørvisstovan, at millum 35 og 60 cm av plastleidningum er uppií hvørjum rúmmetri av føstum gróti. Um 90.000 $m^3$ í føstum gróti verða brúktir til útfyllingina, verða millum 31.500 og 56.000 metrar av spreingileidningi fluttir til verjugarðin á Toftum.

Lýst umhvørvisgóðkenning

[1] Lóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum

Grótið verður flutt við gleiviprámi, sum sleppir tí niður á botn. Stóru partur av grótinum verður liggjandi, har tað er slept, men ein partur skal takast upp á útfyllingina við gravimaskinum. Longri gróti skal søkka og meira tað verður handfarið, størri eru sannlíkindini til, at plastleivdir frá spreingiskipanini losna frá grótinum. Í Føroyum er eingin kanning gjørd av, um plastleivdir av hesum slagnum eisini liggja á botni, men norsk kanning bendir á, at tær flotna spakuliga, og síðani reka tær frá grótfyllingini alt eftir, hvussu vindur og streymur eru.

Umhvørvisstovan metir, at bert ein lítil partur av plastleivdunum, sum losna frá grótfyllingini, rekur upp á land, meðan stóri parturin av plastinum verður verandi í sjónum. Sum heild verður sagt um rákið á Skálafjørðinum, at tað rekur inn við eystara landinum og út við vestara landinum, men rákið er sera spakt, og tí hevur vindur nógv at siga fyri, hvørja leið lutir á vatnskorpuni reka.

Tað gerst alt meira greitt, at plast kann blíva ein stórur lívfrøðiligur, heilsuligur og umhvørvisligur trupulleiki í havinum.

Umhvørvisstovan staðfestir, at verandi spreingiháttur í Eysturoyartunlinum er í samsvari við dagsins tøkni til slík arbeiði, men roynt verður at finna fram til aðra spreingitøkni til grót, sum skal brúkast til grót, sum skal fyllast út á sjónum.

Nes kommuna ætlar at leggja forðing út so at plast verður hildið aftur. Umhvørvisstovan metir, at tað er umráðandi at gera eina ítøkiliga og sjálvstøðuga meting í hvørjum einstøkum føri, hvussu ein forðing best verður skipað. Treytir verða tí settar til, at kommunan ger eina meting av útlátinum av plasti frá verkætlanini, og hvussu ein forðing á besta hátt kann byrja fyri, at plast rekur frá uppfyllingini.

Arbeiði at flyta grót við skipi og at lyfta grót upp á útfyllingina við gravimaskinum kann hava nakað av óljóði við sær. Av tí at talan er um eina tíðaravmarkaða verkætlan, metir US at tað í hesum føri kann vera vikið nakað frá vanligu krøvunum til óljóð og hevur stovnurin valt at taka støði í norsku leiðbeiningini: Retningslinje for behandling av støy i arealplanlegging

Treytir verða settar til óljóð og ristingar.

Nakað av burturkasti stendst av virkseminum, og krøv verða sett til, at verkætlanin hevur skipan til burturkast.

## 5 Málsviðgerð

Í viðgerðini av umsóknini og til áseting av treytum er m. a. hetta tilfar nýtt:

- Umsóknum um umhvørvisgóðkenning frá 25. mai 2018
- Leinging av Grótkasti á Toftum – umhvørvisárnsmeting, Sp/F Terra, 2017
- Umhvørvislýsing av botninum innan ætlandi leinging av brimgarði á Toftum, Biofar 2017-mai.
- Árinsmeting og góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini,
- Moss havn -Kartlegging av plastforurensning i forbindelse med utfylling i sjø, Rambøll Norge 2016
- Retningslinje for behandling av støy i arealplanlegging (T-1442/2012)

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at Nes kommuna leggur virksemið til rættis á ein hátt, so at umhvørvið verður ávirkað minst møguligt,

Lýst umhvørvisgóðkenning

- at avmarka útlát av plasti so nógv sum gjørligt
- at avmarka ampar av óljóði og ristingum so nógv sum gjørligt,
- at avmarka útlát av dálkandi evnum, evju og dusti,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt,
- at mannagongdir at fyribyrgja dálkandi óhappum skulu vera tøkar og
- at útgerð til handfarin av dálkandi óhappum skal vera tøk.

Gongdin í viðgerðin av umhvørvisgóðkenningini er lýst í Kap 2. Umsóknin. Nes kommuna fekk uppskot til umhvørvisgóðkenning til viðmerkingar hin 9. juli 2018. Í viðmerkingunum hin 23. juli 2018 metir Nes kommuna at upprunaliga ásetingin í pkt. 6.2.7 álegði Nes kommunu ov stórar skyldur til upprudding, um so var, at aðrar líknandi verkætlanir høvdu sama dálkingarøki fyri Nonel-leidningsleivdir v.m. Nes kommuna skjýtur upp, at tað ber til at samstarva við aðrar verkætlanir um hesi viðurskiftini. Umhvørvisstovan tekur undir við hesum og hevur broytt ásetingina samsvarandi.

# 6 Góðkenningartreytir

## 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Hendan umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á kommununi, og skulu øll viðkomandi starvsfólk, kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini.

6.1.2 Allar treytir í hesi góðkenning eru eisini galdandi fyri virksemið hjá undirveitarum hjá Nes kommunu, meðan teir arbeiða við omanfyri lýstu verkætlan. Nes kommuna hevur ábyrgdina av, at undirveitarar hjá felagnum halda treytirnar í hesi góðkenning.

6.1.3 Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

6.1.4 Nes kommuna rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.

6.1.5 Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa broyting.

6.1.6 Um virkið skiftir eigara, broytir navn ella verður tikið av, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta.

6.1.7 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið ella beinast burtur. Harafturat skal eigari tryggja at olja, kemikalii ella annað ikki kunnu verða til ampa ella kunna dálka umhvørvið, meðan virkið liggur stilt.

6.1.8 Heldur virksemið uppat áðrenn verkætlanin er liðug, skal Umhvørvisstovan hava boð um skjótast gjørligt frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av, umframt at treytirnar í 6.1.7 verða settar í verk so skjótt sum gjørligt.

6.1.9 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini. Møgulig eftirlitsboð verða bara givin Nes kommuna uttan mun til, um tey fevna um viðurskifti hjá kommununi ella undirveitara.

Lýst umhvørvisgóðkenning

6.1.10 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir ella
- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkenningin varð givin.

6.1.11 Um verkætlanin at byggja havnarlagið er liðug innan 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, fellir henda góðkenning burtur. Verkætlanin verður mett at vera liðug, tá longdi verjugarðurin alment er tikin í nýtslu.

6.1.12 Um verkætlanin ikki er liðug, tá 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað ella um minni dálkandi framleiðsluhættir ella betri reinsingarhættir eru komnir fram.

## 6.2 Innrætting og rakstur

6.2.1 Økið, sum henda góðkenning viðvíkir, skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.2 Arbeiði, har vandi er fyri spilli av dálkandi ella vandamiklum evnum, skulu gerast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.2.3 Høvuðsreglan er, at tað er bannað at koyra grót á sjógv, sum er dálkað við plasti ella øðrum dálkandi evnum.

6.2.4 Um Nes kommuna sleppir grót á sjógv, har væntast kann, at tað er dálkað við Nonel-leidningsleivdum v. m. ella tilsvarandi plastleivdum, skal Nes kommuna tryggja, at møguligar Nonel-leidningsleivdir v. m., sum verða skolaðar leysar av grótinum til at gera verjugarðin, verða hildnar aftur so nær uppfyllingini sum gjørligt, t.d. við eini forðing.

6.2.5 Um forðing verður brúkt, skal Nes kommuna áðrenn arbeiðið byrjar, gera eina ítøkiliga, greiða og grundgivna ætlan fyri, hvørja og hvussu stóra forðing ætlanin er at brúka, hvussu hon tryggjar, at Nonel leidningsleivdir v. m. ikki reka burtur, bæði meðan siglt verður við gróti, og tá tað ikki verður siglt við gróti, og hvussu plastleivdir innanfyri forðingina verða tiknar upp.

6.2.6 Nes kommuna skal regluliga, tó alla tíðina meðan siglt verður, savna Nonel leidningsleivdir v. m., sum verður hildnar aftur innanfyri forðing, og skráseta nøgdina av hesum í vekt.

6.2.7 Nes kommuna skal regluliga fylgja við, tó í minsta lagi eina ferð um vikuna, meðan arbeiðið fer fram og í minsta lagi ein mánað eftir at arbeiðið at gera verjugarðin er liðugt, um Nonel-leidningsleivdir v. m. reka upp á land á Skálafjørðinum og økinum kring verkætlanina. Um samanfall er í dálkingarøki fyri Nonel-leidningsleivdir millum líknandi verkætlanir, kann Nes kommuna gera samstarvsavtalu við aðra verkætlan um hesi viðurskifti. Umhvørvisstovan skal kunnast um, hvussu hetta samstarvið

Lýst umhvørvisgóðkenning

er skipað. Kommunan savnar leivdir v.m. og skrásetur nøgdina í hóskandi vekteind. Kommunan burturbeinir levidirnar til móttakara, sum hevur góðkenning at taka ímóti burturkasti.

6.2.8 Um Nes kommuna brúkar aðra mannagongd enn forðing at tryggja, at møguligar Nonel-leidningsleivdir v. m., sum kunnu verða uppi í grótinum, verða hildnar aftur, skal Nes kommuna somuleiðis áðrenn arbeiðið byrjar, gera eina ítøkiliga, greiða og grundgivna ætlan fyri, hvussu hetta verður gjørt.

6.2.9 Nes kommuna skal savna Nonel leidningsleivdir v. m., sum gravimaskina tekur upp á verjugarðin, eftir hvønn arbeiðsdag.

6.2.10 Nes kommuna skal tryggja, at plastleivdir frá spreingiskipan v.m. ikki reka frá verjugarðinum, eftir at arbeiðið er liðugt.

6.2.11 Nes kommuna skal skjótast gjørligt kunna Umhvørvisstovuna um óvanlig viðurskifti, sum hava ella kunnu føra týðandi dálking við sær.

6.2.12 Ásetingarnar í pkt. 6.2.2 til 6.2.9 eru eisini galdandi fyri grót frá øðrum veitarum enn P/F Eystur- og Sandoyartunlar.

6.2.13 Nes kommuna sendir Umhvørvisstovuni tíðarætlan og mannagongdir viðvíkjandi punktunum 6.2.3 til 6.2.8 í so góðari tíð, at møguligar broytingar kunnu gerast, áðrenn arbeiðið byrjar.

## 6.3 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós

6.3.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum.

6.3.2 Ískoytið frá virkseminum, sum henda góðkenning viðvíkir og beinleiðis avleiddum virksemið til óljóðtyngdina við næsta grannamark, má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk:

| Bygningsslag | Krav um dagin (LpAeq12h 07-19) | Krav um kvøldið (LpAeq4h 19-23) ella sunnu-/halgidagar (LpAeq16h 07-23) | Óljóð um náttina (LpAeq,8h 23-07) |
|---|---|---|---|
| Bústaðir, frítíðarhús, sjúkrahús, røktarheim | 65 dB | 60 Db | 45 dB |
| Skúlar, barnagarðar | 60 dB meðan stovnarnir er í brúki | | |

Óljóðtyngdin: Ljóð, mált sum tað orkujavnaða, A-vigaða ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark.
LpAeq12h 07-19 merkir: miðal orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) í 12 tímar millum kl. 07-19.
Tilsvarandi fyri hinar styttingarnar.

6.3.3 Um Nes kommuna metir, at óljóðið fer at ávirka sama grannalag samanhangandi í meira enn 6 vikur, men styttri enn til og við 26 vikur, verða krøvini í 6.7.2 herd við 3 dB.

Lýst umhvørvisgóðkenning

6.3.4 Um Nes kommuna metir, at óljóðið fer at ávirka sama grannalag samanhangandi í meira enn 26 vikur, verða krøvini í 6.7.2 herd við 5 dB.

6.3.5 Um tað eru at týðilig impulsljóð ella týðiligir eyðkendir reinir tónar er uppi í óljóðinum, kunnu krøvini í 6.7.2 verða herd við 5 dB. Impulsljóð kann stava frá boring, hamring, høgging og øðrum sláivirksemi. Reinir tónar kunnu koma frá útgerð sum pumpum og viftum.

## 6.4 Burturkast

6.4.1 Alt burturkast frá omanfyri nevnda virksemi skal handfarast og skiljast í samsvari við kunngerð[2] um burturkast og galdandi reglum hjá móttakara.

6.4.2 Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

6.4.3 Burturkast skal altíð goymast í hóskandi íløtum ella bingjum, og ikki vera til ampa ella elva til dálking.

6.4.4 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í týðiliga merktum hóskandi íløtum, t.d. UN-góðkendum íløtum.

6.4.5 Íløt við serliga dálkandi burturkasti skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum tøttum øki.

6.4.6 Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skulu verða sett og tryggjað soleiðis, at tey ikki fúka í vindi.

## 6.5 Rakstarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing

6.5.1 Nes kommuna skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd av gróti, sum er brúkt til verkætlanina í føstum tilfar, sum $m^3$
- Nøgd av innsavnaðum Nonel leidningsleivdum v. m. og øðrum tilfari frá spreingiútgerð, ella annað tilsvarandi tilfar, býtt upp í innanfyri forðing ella tilsvarandi, uppi á landi og á ymsum støðum á Skálafjørðinum og økinum kring verkætlanina, í grammum.

6.5.2 Eftirlitsmyndugleikin skal til eina og hvørja tíð kunna síggja rakstrarskrásetingarnar ella biðja um avrit av rakstrarskrásetingunum, sum skulu goymast í 5 ár.

6.5.3 Nes kommuna skal í seinasta lagi 6 vikur eftir at longri steðgur er í arbeiðinum ella á hvørjum ári gera ein umhvørvisfrágreiðing við:

- uppgerð av rakstrarskrásetingunum og lyklatølum,
- frágreiðing um viðlíkahald og óhapp við umhvørvisligum árinum
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk

6.5.4 Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19.10.1995 um burturkast.



Lýst umhvørvisgóðkenning

## Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Lýst umhvørvisgóðkenning